## Hósdagur 20. september

### SVF

18.30 Gloymdar leikur 6:13
18.40 Jumanji 22
19.05 Tær friðarligu gorillurnar - am. náttúrusending
20.00 Dagur og Vika við Grannum Okkara
20.50 Horvin 2:8
21.20 Ally McBeal - am. rød
22.05 TV2 dok.: Aftan fyri læstar dyr - donsk dokumentar
22.50 Krimitímin: Dalziel og Pascoe
23.35 Liðugt

### Eurosport.com

7.30 Sailing
8.00 Sailing
9.00 Football
9.30 Sumo
10.30 Motorsports. Series
11.00 Car Racing
11.30 Sailing
12.00 Cycling
13.30 Cycling - Live
16.30 Beach Volley
17.00 Xtreme Sports
17.30 Cliff Diving
18.00 Cycling
19.30 Boxing
21.30 Rally
22.00 News
22.15 Football
23.15 Cycling
23.45 Rally
0.15 News
0.30 Close

### BBC Prime

0.05 TLZ: »American Visions – The Gilded Cage«
1.00 TLZ: »Century of Flight – The Parachute Story«
2.00 TLZ: »Adverts – The Ad Factor«
2.30 TLZ: »On Pictures and Paintings«
2.55 TLZ: »Mind Bites«
3.00 TLZ: »Lessons From Kerala«
3.25 TLZ: »Mind Bites«
3.30 TLZ: »African Renaissance«
4.00 TLZ: »Back to the Floor – Into the Lion's Den«
4.40 TLZ: »Landmarks – Tropical Rainforests – Destroying the Forest«
5.00 TLZ: »Japanese Language and People – Eating, Drinking«
5.30 TLZ: »Teen English Zone«
5.55 Joshua Jones: »The Key«
6.05 Playdays
6.25 The Really Wild Show - Thailand
6.50 Celebrity Ready Steady Cook
7.20 Dream House
7.50 Real Rooms: »Nottinghamshire Country Cottage Bedroom«
8.20 Going for a Song
8.50 Style Challenge: »Little and Large Couple«
9.15 Zoo
9.45 Vets in Practice: »In at the Deep End«
10.15 The Weakest Link
11.00 Dr. Who: »Resurrection of the Daleks«
12.00 Eastenders
12.30 Hetty Wainthrop Investigates: »Fingers«
13.25 Celebrity Ready Steady Cook
13.55 Style Challenge: »Golden Girls/Golfing Ladies«
14.20 Joshua Jones: »The Key«
14.30 Playdays
14.50 The Really Wild Show - Thailand
15.15 Totp Eurochart
15.45 Great Antiques Hunt: »Cornwall«
16.15 Gardeners' World
16.50 Miss Marple: »The Body in the Library«
17.45 The Weakest Link
18.30 Cardiac Arrest: »A Cold Heart«
19.00 Eastenders
19.30 Heartburn Hotel
20.00 Down to Earth: »Do as you would be done by«
21.00 French & Saunders
21.30 Seeking Pleasure: »Children's Parties«
22.10 Holiday Snaps: »Majorca/Ibiza/Prt Grimaud/Sanremo«
22.30 Muscle
23.00 Out of Hours

### BBC World

0.00 BBC News
0.30 HARDtalk (r)
1.00 BBC News
1.30 Holiday (r)
2.00 BBC News
2.30 Reporters (r)
3.00 BBC News
3.30 Asia Today (r)
3.45 World Business Report (r)
4.00 BBC News
4.30 HARDtalk
5.00 BBC News
5.30 World Business Report
6.00 BBC News
6.30 World Business Report
7.00 BBC News
7.30 World Business Report
7.45 Sport Today
8.00 BBC News
8.30 Talking Movies (r)
9.00 BBC News
9.30 HARDtalk (r)
10.00 BBC News
10.30 Holiday (r)
11.00 BBC News
11.30 Simpson's World (r)
12.00 BBC News
12.30 HARDtalk (r)
13.00 BBC News
13.30 World Business Report
13.45 Sport Today
14.00 BBC News
14.30 Top Gear (r)
15.00 BBC News
15.30 Simpson's World (r)
16.00 BBC News
16.30 Asia Today
17.00 BBC News
17.15 World Business Report
17.30 Talking Movies (r)
18.00 BBC News
18.30 World Business Report
18.45 Sport Today
19.00 BBC News
19.30 HARDtalk (r)
20.00 BBC News
20.30 Click Online
21.00 BBC News
21.30 World Business Report
22.00 BBC News
22.30 Life
23.00 BBC News
23.30 World Business Report (r)
23.45 Asia Today

### 3

5.00 Børne-hjørnet med Disney
7.00 TV-shop
8.00 Panter-tanter (G)
8.25 Ricki Lake (G)
9.15 Ricki Lake
10.10 Horton-sagaen (G)
11.00 Horton-sagaen
11.50 Blossom (G)
12.20 Panter-tanter
12.50 Vild med dig
13.15 Pæn pige - sej sild
13.45 Interne affærer
14.40 Blossom
15.10 Min kære familie
15.40 Baywatch Hawaii
16.35 Ricki Lake
17.30 Alle tiders barnepige
18.00 Felicit
19.00 Robinson - Talkshow
20.00 Tilbage til fremtiden
23:10 Tve-kampen VIP (G)
23.45 Simpsons
0.15 Ti tommelfingre
0.45 Interne affærer (G)
1.45 Ricki Lake (G)
2.40 Vore værste år (G)
3.10 Simpsons (G)
3.35 Sunset Beach
4.25 Godnat

### ÚF

7.00 Tíðindi
7.05 Morgunlestur - Torkil Haraldsen í Sørvági lesur
7.15 Morguntónleikur
7.30 Tíðindi
7.35 Góðan morgun Føroyar - Kári Olsen og Dia Midjord leggja til rættis
8.00 Tíðindi
8.05 Góðan morgun Føroyar
9.00 Tíðindi
9.03 Frásøgn (e) - Árni Joensen skrivar
9.35 Dagsins tónar
9.50 Morgunlestur (e) - Torkil Haraldsen í Sørvági lesur
10.00 Tíðindi
10.03 Fimleikaløtan 1 - Beinta og Elsa Maria skipa fyri
10.10 Tit skriva, vit spæla - Øssur Egholm skipar fyri
11.00 Tíðindi
11.03 Undir døgurða
12.00 Veðurtíðindi
12.03 Middagstónleikur
12.15 Skráin og lýsingar
12.20 Tíðindini
12.40 Døgurðatónar
13.00 Tónatímin
14.00 15 tær bestu (e) - Heðin Arge stílar fyri
15.00 Tíðindi
15.03 Nýtt og gott gamalt - Tróndur Vatnhamar velur løgini
16.00 Tíðindi
16.03 Handan hav (e) - Tónleikasending hjá Fróða Løkságarð
17.00 Tíðindi
17.05 Í víngarðinum - Símun Jónnesarson Hansen leggur til rættis
18.00 Barnaútvarpið - Jonna Olsen og Kári Sólstein leggja til rættis
18.25 Skráin og lýsingar
18.30 Tíðindini
18.50 Tónleikur
19.00 Hvussu við mær? - Framhaldssøga eftir Colby Radowsky. Knút Olsen týddi. Katarina Nolsøe lesur. 6. partur
19.30 Løg mær dámar - 2. sending hjá Eirik Suna Danielsen
20.00 Ljóðmúrurin - Bjarni Mohr leggur til rættis
21.00 Fimleikaløtan 1 (e) - Beinta og Elsa Maria skipa fyri
21.05 Dagsetur - Øssur Egholm leggur til rættis
22.00 Tíðindi

## Aftan fyri læstar dyr

SVF Hóskvøldið kl. 22.05

– Donsk dokumentarsending.

Hesi seinastu árini eru mál um børn, sum eru fyri seksuellum yvirgangi á dagstovnunum, vorðin nærum gerandiskostur í útlendskum bløðum. Ýður tað av pedofilum í barnagørðunum, ella hava øll mist vitið? TV2 dok. hyggur at nøkrum pedofilimálum, og fyri fyrstu ferð verður avdúkað, hvat nøkur av børnunum hava fortalt, tá tey vórðu avhoyrd í teim ymisku málunum. Sendingin prógvar, at vitnisfrágreiðingarnar hjá børnunum als ikki eru so einfaldar at greiða.

## Felicity (5)

### »Halloween«




Amerikansk dramarøð.

Á veg til íbúðina hjá Ben, verða Ben og Felicity álopin og rænd. Hetta knýtur tey nærri, og tey avgera at fara til Halloween veistluna sum eitt par. Men í veitsluna hevur Ben eyga fyri øllum uttan Felicity. Zack og Julie knýtast tættari at hvørjumøðrum, meðan tey hyggja eftir ræðufilminum »Eksorcisten«.

## Aftur til framtíðina 3




Amerikanskur dramaskemtifilmur frá 1990.

Enn eina ferð noyðist Marty McFly at fara aftur í tíðina. Hesaferð fer hann aftur til 1885, har hann skal bjarga Doc Brown og tí ræðuligu Tannen familjuna. Men Marty fær sjálvsagt nógvar trupuleikar á vegnum, og tað er ikki lætt at koma aftur til nútíðina, tá tíðarmaskinan t.d manglar bensin.

### Rás 2

9.45 Orðið - Bíbliulestur v/ Anju Hansen
10.00 Go'morin - Skráin, veðrið, aktuelt, dagsins mál, prát við lurtarar og tónleikur
11.00 Birgir Beinleiðis - Birgir Sondum við gesti
12.00 Tíðindi
12.10 Léttur tónleikur
13.30 Ynskiløtan - Heilsur frá lurtarunum - Laila Jacobsen er vertur - Send heilsur via (www.ras2.fo) ella á fax. 359990
15.00 Tíðindi
15.10 Ynskiløtan (framhald)
16.00 Léttur tónleikur
17.00 Norðlýsið - Aktuell sending úr Studio 7 í Klaksvík - John William og Oliver Joensen leggja til rættis
18.00 Tíðindi
18.10 Léttur tónleikur
19.00 Orð á leiðini EvR Sending - Andaligur búnaðskapur: »Týdningurin av dagligum samfelagi við Gud« - Jógvan Zachariassen leggur til rættis
19.40 Tónleikur
21.00 Tíðindi
21.15 Orðið (e) - Bíbliulestur v/ Anju Hansen
21.30 Girlzone - Undirhaldssending fyri ung, Súsanna Clementsen og Ruth Reinert skipa fyri - Telefon: 35 99 93 Fax: 35 99 90 E-mail: girlzone@ras2.fo
0.00 Liðugt

### Lindin

13.00 Byrjan - Dagsskráin verður lisin
13.15 Okkara dagliga breyð
13.30 Sjómanssendingin Vitin v/ M.C. Restorff (e)
14.30 Tónleikur fyri børn
15.00 Tónleikur
18.00 Dagsins Orð eftir Svenning av lofti
19.00 Brot og bitar ein ørvísi tíðinda-sending.
19.15 »The finishing touch« v/ Alex O'Campo
20.30 Okkara dagliga breyð
20.40 Lýsingar fyri møtir ið verða í vikuskiftinum
20.55 Dagsins Orð eftir Svenning av lofti (e)
21.00 Bønarlinjan, beinleiðis sending við gesti vertur er Jenis av Rana - Bønarevni kunnu ringjast inn frá kl. 20.00. Tlf. 321377 og til ber at senda fax á nr. 321379 Vit gevast uml. middnátt

# ítróttur

Nr. 177 • fríggjadagur • 14. september 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

# Ion aftur í HB

**Eftir at spælarar og leiðsla í felag hava heitt á rumenan, hevur Ion Geolgau tikið uppsøgn sína til HB aftur**

VENJARI
*Jákup Mørk*

Tað var mánakvøldið, at boðini um uppsøgnina hjá HB venjaranum, Ion Geolgau, bórust kring landið, og sum vit nevndu í mikudagsútgávu okkara, so var hetta ein avgerð, sum leikarar í felagnum vóru sera keddir um.

Millum annað staðfesti HB-liðskiparin, Rúni Nolsøe, at tað so avgjørt ikki var venjaranum at lasta, at úrslitini í ár hava verið verri, enn tey nakran tíð hava verið.

### Eftir áheitan frá leikarunum

Leikararnir í felagnum hava tó ikki bert nýtt tíðina síðani hetta til at sita hendur í favn og syrgja um missin av venjaranum. Longu mikukvøldið frættist, at Ion kortini fer at halda fram í HB, og eftir dystin móti GÍ fingu vit hesi tíðindi staðfest av stjóranum í P/F Havnar fótbóltur, Steinfinni Mittelstein.

- Fyrst og fremst skal sigast, at fyri okkum kom uppsøgnin hjá Ion sera óvæntað. Síðani hetta hava vit tosað við leikararnar, og teir vóru á einum máli um, at vit skuldu gera eina roynd at tosa við venjaran.

- Tað hava vit so gjørt, og eg kann bara fegnast um, at vit hava fingið tosað okkum til rættis, soleiðis at Ion hevur gjørt av at koma aftur til felagið. Tað harmaði okkum almikið, tá hann tók avgerðina mánadagin, tí vit ivast ikki í, at hann eisini hevur nógv at geva frá sær framyvir, sigur Steinfinnur Mittelstein at enda.



*Ion Geolgau segði upp í HB mánadagin, men eftir at leikararnir í felagnum staðiliga hava heitt á venjaran um at halda fram, er uppsøgnin nú tikin aftur*

# Hull tapti

Julian Johnsson og liðfelagarnir úr Hull City eru úti úr ensku steypakappingini, eftir at teir mikukvøldið máttu lúta 3-0 fyri Premier League felagnum, Derby.

Tað var tó ikki bara uttan víðari, at Julian og teir løgdu seg niður fyri Ravanelli og Co., tá dystast varð á Pride park. Serliga í fyrra hálvleiki var Hull væl við, og millum annað mundi Gary Alexander skorað, eftir at Julian hevði lagt innfyri, og tvær aðrar ferðir var Derby málið eisini hótt.

Deon Burton fekk tó sissa heimaliðið beint undan steðginum, og eftir hetta var eingin ivi um, hvønn veg dysturin skuldi koppa. Derby hevði tamarhald á seinastu trý korterini, og við enn einum máli frá Burton og einum frá Kinkladze.

***-jm***

# Óli var millum málskjúttarnar

**Feløgini hjá bæði Óla Johannesen og Øssuri Hansen vunnu mikukvøldið í steypakappingini, meðan hinir útisetarnir í Danmark ikki spæla í hesi vikuni**

ÚTISETAR
*Jóannes Hansen*



Í flestu londum hava fótbóltskappingarnar verið avlýstar, síðani stóra sorgaleikin týsdagin í USA. Men í Føroyum og í Danmark hevur verið spælt, sum tað frammanundan var ætlað.

Mikukvøldið var triðja umfarið í donsku steypakappingini á skránni. Hóast Óli Johannesen sá reyða kortið í landskappingardystinum sunnudagin, so var hann ikki leikbannaður, tá Hvidovre var á útivølli ímóti Glostrup, ið er felagið, sum beiggi Óla, Jón Johannesen, seinnapartin av níti árunum spældi í.

Hvidovre vann steypadystin 4–0, og Óli Johannesen taldist millum málskjúttarnar. Hvidovre kom á odda í 33. minutti, og tríggjar minuttir seinni økti Óli Johannesen. Fimm minuttir undan steðginum øktu teir til 3–0, og ellivu minuttir eftir steðgin staðfestu teir stórsigurin.

Øssur Hansen og B93 høvdu vitjan av gamla felagnum hjá Jákupi Mikkelsen, Herfølge, sum nú er í næstbestu deildini. Eftir longda leiktíð var støðan framvegis 1–1, og so var neyðugt at avgera við brotssparkskapping. Endaliga úrslitið var 5–4 til B93. Fjórða umfarið í steypakappingini verður spælt komandi mikukvøld. Finalan verður í Parkini Kristi Himmalferðardag, sum er hósdagin 9. mai.

### OB í kreppu

Felagið hjá Johan Byrial Hansen, OB, var mikukvøldið í Esbjerg og spældi útsettan landskappingardyst. Heimaliðið vann 2–0, og nú er kreppuprát í OB, sum er dygst omanfyri niðurflytingarstrikuna. At teir í Odense eru ørkymlaðir er m. a. komið til sjóndar við, at í trimum dystum á rað hava teir fingið reytt kort ímóti sær. Í donsku pressuni verður mett, at OB venjarin, Troels Bech, hongur í einum kløn um tráði. Tað verður roknað við, at hann verður uppsagdur, um OB komandi sunnudag tapir landskappingardystin á heimavølli ímóti AB.

Tað var Troels Bech, sum áður hevur verið venjari í Horsens, ið syrgdi fyri, at føroyski landsliðsmaðurin, Johan B. Hansen, varð keyptur til OB.

Hvørki Christian Høgni Jacobsen í Esbjerg ella Johan B. Hansen í OB vóru á dómaraseðlinum mikukvøldið.

### Útsett eina viku

Todi Jónsson og FCK skuldu í gjárkvøldið havt spælt í Parkini ímóti Obilic úr Jugoslavia. UEFA gjørdi mikudagin av, at allir Europa Cup dystirnir skuldu útsetast.

Í gjár frættist, at dystirnir í UEFA Cup verða spældir í komandi viku. Tað vil siga, at í staðin fyri tvær vikur ímillum dystirnar, so verður bara ein vika frá heimadystinum og til útidystinum í hesum umfarinum.

Danska blaðið BT visti í gjár at siga, at nú hevur FCK skrivað sáttmála við 24 ára gamla georgiska álopsmannin, Mikhail Ashvetia. Blaðið sigur seg vita, at FCK hevur rindað Torpedo Kutaisi 7,8 milliónir fyri landsliðsspælaran. Fyri ein spælara, sum kemur úr landi við ússaligum livikorum, man tað vera stórur munur á at koma til Danmarkar og at fáa eina mánaðarløn upp á 85 túsund krónur. Tað sigur BT seg vita, at fremmandi maðurin fer at fáa. Tað er ikki so galið, tá skattatrýstið hjá útlendskum spælarum tey fyrstu árini í Danmark bara er 25%!